tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 65 Týsdagur 2. apríl 1996 70. árgangur Krónur 7.00

## Finnbogi, Óli og Helena saman um nýtt blað



*Óli Breckmann og Finnbogi Ísakson - fara teir nú aftur at stinga høvdini saman?*

**Øll trý eru tey politikarar, sum hava lagt nógva orku í eina politiska karrieru. Nú vera tey í felag um nýtt politiskt - óheft - málgagn.**

*Síða 7*

## Boringin í Lopra útsett ein mánað

**- Alt bendir á, at Árni Brattaberg fær arbeiðið at gera bygglokið klárt**

*Síða 3*

### Kendir vinnulívsmenn:



# Nyttar einki at privatisera Føroya Banka

**- Eingin føroyingur hevur ráð, og eingin útlendingur torir at keypa Føroya Banka. Sjálvur hevur Olaf Olsen ikki ráð at keypa partabrøv, Poul Mohr hevur ongan serligan áhuga, og Birgir Danielsen kundi væl hugsað sær tað, um tað var ein góð forrætning.**

*Síða 10-11*

### Handbólturin:

# Kyndil fór við gullinum



*Kyndlaleikarar fegnast um 33-16 sigurin á Vestmenningum leygarlagin. Mynd: Áki*

**- Kyndil smurdi VíF av í avgerandi dystinum um FM-gullið. Stíf vann sín dyst, men tað var bert nóg mikið til silvurið.**

*Ítróttur síðurnar 12,13,14,15,16,17 og 18*




*Øll loyvi ikki fingin enn:*

# Boringin í Lopra útsett ein mánað

*- Alt bendir á, at Árni Brattaberg fær arbeiðið at gera byggiplássið klárt.*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað er nú greitt, at boringin í Lopra byrjar ikki í mei sum ætlað.

Øll loyvi eru ikki fingin til vega enn og tí er arbeiðið útsett.

Fyribils verður roknað við, at tað verður seinkað ein mánaða og byrjar eina ferð í juni ístaðin.

Arne Rosenkrands Larsen á Danop sigur, at tað er eini góðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, bíðað verður eftir.

Men hann leggur dent á, at onki óvanligt er á vási og avgreiðslan má bara taka tað tíð, hon tekur.

Og hann leggur afturat, at teir sjálvandi ikki kunnu byrja, fyrrenn øll loyvi eru fingin til vega.

Heilsufrøðiliga starvsstovan skal umhvørvis góðkenna ætlanina og so langt er hon ikki komin enn.

Øll Viðgerðin hevur tikið longri tíð, enn vit høvdu roknað við, sigur Arne Rosenkrands Larsen.

- Men hetta fær ongar avleiðingar fyri ætlanina annars ella fyri teir sáttmálar, sum annars eru gjørdir.

- Vit eru enn á einum stigi, har vit mugu verða eitt sindur liðilig, sigur hann.

Arne Rosenkrands sigur, at fyrst var tað eitt sindur ógreitt, hvør skuldi geva ymisk loyvi.

Tað varð so greitt, at tað var Heilsufrøðiliga Starvsstovan. Hon hevur síðan fingið tilfarið, men roknast má við eini ávísari avgreiðslutíð.

Men harumframt er ein freist at kæra tað avgerð. Heilsufrøðiliga starvsstovan tekur.

- Allar hesar tíðarfreistir skulu haldast, sigur Arne Rosankrands Larsen.

## Á summarmála

Marjun Hanussardóttir á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni sigur, at tilfarið til góðkenningina kom ikki fyrren fyri eini viku síðan, men at tey leggja dent á at avgreiða umsóknina skjótt.

Tilfarið er at kalla fullfíggjað, so arbeiðið skuldi gingið hampiliga skjótt, heldur hon. Hon roknar við, at tey hava avgreitt málið um 14 dagar.

Men aftaná er ein kærufreist uppá fýra vikur og høvuðsreglan er, at arbeiðið skal liggja stilt í kærufreistini.

## Helst Árni

Tað er enn ikki gjørt av, hvør fær arbeiðið at gera boriplássið klárt.

Arne Rosenkrands Larsen sigur, at teir eru komnir heilt væl áleiðis í endaligu samráðingunum. Men enn eru onkur smáttari eftir at fáa greiði á og fyrrenn avgerð er tikin, vil hann ikki siga meir um tað.

Sjey tilboð komu inn uppá arbeiðið. Lægsta tilboðið hevði Árni Brattaberg í Vági. Hann bjóðaði sær at gera arbeiðið fyri 987.100 krónur, tað eru bara 4.000 lægri enn næstlægsta tilboðið.

Og alt bendir á, at tað verður hann, sum fær arbeiðið.

Árni Brattaberg váttar at nógv samband hevur verið millum seg og landsbyggifelagið, sum fyrireikar arbeiðið fyri Danop í sambandi við arbeiðið. Og so vítt hann veit og onki til hindurs fyri, at hann fær tað. Men fyrrenn endalig avgerð er tikin, vita vit sjálvandi onki, sigur hann.



*Refleks*
Oljuovnar, rør og eykalutir
eru á goymslu
UMBOD
Pf.
Kaj Andreasen & Co
Tlf. 15600



Tórshavnar Trafikkskúli
Koyrikort til:
Buss
Lastbil
Trailara
Staravegur 5
Tlf. 18821-15296 farttlf. 88777



KOYRIKORT
Privat
sum vinnuligt
– so er tað ...
KOYRISKÚLIN
Á ARGJUM
Ring og bið um tíð
12270 / 86680